# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# TINGIÐ SKAL IKKI STÝRA ØLLUM

Sambandstingmaðurin í Norðoyggjum arbeiðir framvegis við at snikka til eitt uppskot um at minka tingmannatalið úr 33 niður í 25. *»Tað er ov dýrt at hava 33 tingfólk í einum so lítlum landi, sum okkara«*, sigur hann.

Vit hava fleiri ferðir fyrr á hesum stað umrøtt starvsviðurskifti hjá politikarumum. Sjálvandi skulu vit gjalda okkara kosnu monnum og kvinnum góða løn - tað krevur sítt at vera politikari. Men tingfólk áttu á onkran hátt at skert sínar egnu ágóðar, tá tað leikar so hart á. Tað hevði í øllum givið veljaranum eitt signal um, at tingfólk vilja standa øksl móti øksl við skattaborgaran, sum verður knokkroyttur við øktum skattum, ongum lønarvøkstri og uppsagnum.

Uppskotið hjá Bjørn Kalsø og øðrum tykist í fyrstu syftu sum eitt populistiskt paraduuppskot. Men við at hugsa gjøllari um tað, so er tað beinleiðis vandamikið - ein hóttan ímóti demokraiinum. Men løgtingið hevur hesa heimildina. Finnur Bjørn Kalsø sín meiriluta, ja so verður tingsfólkatalið broytt hareftir. Ætlar hann so at brúka spardu pengarnar - sum hann sjálvur nevndi í Sosialinum mánadagin sum ein møguleika - til skrivarar til tingfólk, ja so ger hann tað.

Vit halda fyri tað fyrsta, løgtingið ikki skal hava heimild til at áseta lønar- og pensjónsviðurskifti hjá sær sjálvum. Vit halda eisini, at stórmál, sum tildømis at broyta valskipanina, valdømi og at broyta talið á tingfólkum, sum tað minsta eiga at viðgerast av tveimum tingum: At vit hava eitt løgtingsval ímillum. Soleiðis var tað við valrættaraldrinum á sinni. Fyri valið í 1984 samtykti løgtigið at broyta valrættaraldurin frá 20 til 18 ár, men broytingin kundi ikki fáa gildi fyrr enn næsta løgting eisini hevði samtykt tað, og soleiðis kom broytingin ikki í gildi fyrr enn til løgtingsvalið í 1988.

Latið nú skilafólk greiða hetta málið við valdømum og tali av tingfólkum. Fyri at eitt parlament skal kunna fungera við øllum sínum funktiónum, og fyri at eitt rímuligt býti skal vera millum øki og kyn í landinum, so krevst eitt ávíst tal. Latið tí tingskipanina fáa frið, so hon fær ein møguleika at virka.

Men vilja tingfólk sýna stórsinni, so er at kvinka lønina hjá sær eitt sindur niður - og pensjónina við. Og at broyta ferðaendurgjaldið hjá tingfólkum til tað sama, sum onnur fáa.

Tá vísa tingfólk, at tey meina tað í álvara.



**Løgtingið hevur heimildir, sum tað ikki átti at havt...**

## Astrup og Teitur á Hvonn Live

Leygarkvøldið bjóðar Rás2 aftur Hvonn Live. Hetta er stór live-sending, sum verður send beinleiðis av Hvonn í Havn. Rás2 hevur í hálvtannað ár sent Hvonn Live regluliga, og nógvir føroyskir og útlendskir gestir hava verið við í sendingini. Teirra millum eru Lars Løkke Rasmussen, Sólrun Jákupsdóttir, Liza Marklund, Peter Aalbæk Jensen, Anna Nygaard, Frændur, Jo Nesbø og mong onnur. Leygarkvøldið verður politiskt kjak við Jørgeni Niclasen, Helenu Dam á Neystabø og Høgna Hoydal. Tosað verður um sparingar mótvegis vælferð, um raðfestingar ella manglandi raðfestingar og um sláimaskinuna. Jørn Astrup Hansen er komin aftur til Føroya at verða bankastjóri. Hann greiðir frá, hvussu tað er at gera comeback í føroyska fíggjarheiminum, og hvussu mann fær eitt tilboð um at gerast bankastjóri. Kringvarpssmaðurin Súni Merkistein er seinnu árini farin í dýbdina við fleiri evnum - seinast føroysku poppsøguni. Tosað verður við Súna um at grava og granska og framleiða dokumentartilfar til føroyingar. Teitur Lassen og Jógvan Hansen, sum í nógv ár hava gjørt vart við seg uttanlands, vitja Hvonn Live. Prátað verður við teir um fyrimunir og vansar við at ferðast við tónleiki, og teir spæla báðir live á Hvonn. Hvonn Live verður at hoyra á Rás2 leygarkvøldið frá kl. 20 til 22. Eisini ber til at koma á Hvonn at uppliva sendingina beinleiðis.





**Homofobi - intolerancens vold**

NAVI PILLAY
ST-HÁKOMISERUR
KJAK Á SÍÐU 36



**Sálarligur yvirgangur**

ÓLI JACOBSEN
KJAK Á SÍÐU 37

## Fýra farnir á sjónum

Eins og undanfarnu ár, skipar Føroyska Sjómansmissiónin fyri minningarhaldið teirra sjólætnu allahalgannadag, mánadagin 1. november.



Minningarhaldið verður á Vinnuháskúlanum, Nóatún 2, í Havn, kl 10, har Kaj Leo Holm Johannesen, løgmaður og Derhard Jógvanson, prestur tala

Aftaná verður farið niðan til minnisvarðan í Viðarlundina, har løgmaður leggur krans.

Øll eru vælkomin til minningarhaldið.

Fýra mans eru farnir á sjónum síðsta árið

Teir eru:

*Hilbert Martin Blástein, Viðareiði, doyði umborð á »Polarhav« 12/11-09, 29 ára gamal.*

*Hans Jørgen Dam, Sandavági, doyði umborð á donskum farmaskipi við Florida 20/11-09, 68 ára gamal.*

*Martin Sofus Johannesen, ættaður úr Klaksvík, druknaði við Bursatanga 15/5-2010, 52 ára gamal.*

*Finn Jacobsen, Vágur, hvarv av bingjuskipinum »Taasinge Maersk« í juli 2010, 53 ára gamal.*

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814, aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*